# Alment sjónvarp í 25 ár



*Asbjørn Skaale var fyrsti stjórin í SvF*



*Almenna sjónvarpið byrjaði 1. september í Vørðsluni*

1. september 1984 varð Sjónvarp Føroya alment tikið í brúk, so í dag 1. september 2009 kann sjónvarpið hjá Kringvarpinum hátíðarhalda 25 ára dagin.

Tað var 1. apríl 1984 at Sjónvarp Føroya tók yvir, eftir at privat sjónvarpsfeløg høvdu sent sjónvarp í nøkur ár. Týskvøldið 3. apríl 1984 kl. 20 sendi Sjónvarp Føroya sína fyrstu royndarsending, sum m.a. var frá hátíðarhaldinum, tá ið samtíðarskattaskipanin var tikin í nýtslu. Fyrsti stjórin í Sjónvarpi Føroya var Jógvan Asbjørn Skaale.

Í sambandi við 25 ára haldið sleppa hyggjarar kring landið fríggjakvøldið at síggja sendingina „Føroyar í 25 ár“. Hetta er ein sending við gestum í studio, kryddað við útvaldum tilfari, sum sigur eitt sindur um farnu fjórðingsøldina, sæð ígjøgnum SVF-upptøkutólið.

*mg*



*Torbein Rein í sendihølinum hjá Sjónvarpsfelagnum í 1978*

# 25 ára starvsdagar



*Jógvan Páll Johannesen og Bergljót Debes Hentze*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Jógvan Páll Johannesen og Bergljót Debes Hentze hava verið við í sjónvarpinum frá byrjan. Tey vórðu bæði sett í starv 1. august 1984 og vóru við til at fyrireika almenna sjónvarpið sum byrjaði 1. september.

Bergljót byrjaði sum programmedarbeiðari. Hon hevur m.a. arbeitt á tíðindadeildini og mentanardeildini. Í dag er hon á dokumentardeildini. Jógvan Páll hevur arbeitt sum teknikari og ljóðmaður øll árini og havt við upptøkur og redigering at gera.

*mg*

### Brúdleyp



Leygardagin 5. sept. kl. 12.00 giftast í Skopunar kirkju Jacoba Winther og Jón Tór Baldvinsson, Skopun. Veitslan verður kl. 18.00 í Samljóð í Skopun. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, kunnu siga frá á tlf. 259320 ella 213777 innan hóskvøldið 3. sept.